ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 11. desember 2009

# Stjørnan og Tjaldur í oddabraki

**Tey bæði liðini, alt snýr seg um í oddanum í Sunset-kappingini, bresta saman í KÍ-høllini sunnudagin. Í Atlantic Airways-kappingin er størsti spenningurin, um StÍF í morgin kann gera nakað við Neistan**




Hilmar Jan Hansen

Higartil hevur hondbóltskappingin hjá kvinnunum stórt sæð bert snúð seg um tvey lið, Tjaldur og Stjørnuna, sum eru suverent tey fremstu og eisini hava roynst nógv betur enn nakað av hinum liðunum.

Tjaldur og Stjørnan eru ávikavist átta og seks stig framman fyri Neistan, sum er næsta liðið. Tað er tó ikki bara í stigum, at øgiligi munurin á hesum báðum og restini kemur til sjóndar. Tey bæði fremstu liðini hava ávikavist +91 og +77 í málúrtøku, meðan Neistin á triðja plássi hevur +6!

Sunnudagin bresta tey saman fyri aðru ferð, tá Stjørnan á heimavølli í KÍ-høllini tekur ímóti Tjaldri. Fyrru ferðina, sum var í Runavík síðst í oktober, royndist Tjaldur væl drúgvari, men spurningurin er so, um Stjørnan hevur tikið seg so mikið fram, at tað kann verða øðrvísi hesa ferð.

Í Havn tekur Neistin ímóti StÍF, sum brádliga bara er tvey stig aftan fyri tær bláu, sum eru útslignar úr steypakappingini og nú bara hava bronsuna eftir at stríðast fyri. Triði dysturin er botnuppgerð í Vági, har VB tekur ímóti VÍF, sum hevur tvey stig, meðan VB enn eigur fyrsta stigið til góðar.

## Neistin og so hini

Hjá monnunum sær út til, at Neistin gongur sínar egnu leiðir og dregur frá hinum, ið eru fleiri um kappingina nakað aftanfyri. Hesa ferð tekur Neistin á heimavølli ímóti StÍF, sum enn er fremsti avbjóðarin – men altso er heili fýra stig aftan fyri oddaliðið.

Skal kappingin snúgva seg um annað, enn hvør skal í FM-finalu saman við Neistanum, mugu strandingar vinna. Ivasamt er tó, um teir hava styrkina til tað, nú teir í morgin skulu reisa seg eftir heimatap fyri kollfirðingum, samstundis sum Neistin reið stormin av og vann í Vestmanna síðst.

H71 liggur aftur upp á lúr eftir týskvøldssigurin á Kyndli, og sunnudagin skulu hoyvíkingar taka ímóti VÍF, ið er aftast, men tykist vera í ferð við at fóta sær eftir vánaligu byrjanina. Í hinum dystinum sunnudagin er talan um eina spennandi uppgerð millum KÍF og Kyndil, har størsti spenningurin er, um kollfirðingar enn eina ferð taka øll á bóli.




**Stjørnan tekur sunnudagin ímóti Tjaldri í oddabrakinum í Sunset-kappingini, ið skal staðfesta, um Tjaldur framvegis hevur munin ella Stjørnan hevur tikið seg nóg nógv fram**

Mynd: Álvur Haraldsen

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 13/12 | 14.30 | Neistin-StÍF |
| 13/12 | 15.00 | Stjørnan-Tjaldur |
| 13/12 | 15.00 | VB-VÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 12/12 | 17.00 | Neistin-StÍF |
| 13/12 | 16.00 | H71-VÍF |
| 13/12 | 16.00 | KÍF-Kyndil |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 13/12 | 13.30 | Mjølnir-SÍ |
| 13/12 | 14.00 | ÍF-Dráttur |
| 13/12 | 15.00 | Fleyr-TB |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 12/12 | 14.00 | ÍF-Fleyr |
| 13/12 | 15.30 | Mjølnir-SÍ |

# Tvífaldar toppuppgerðir

**Í Eik-liguni hjá bæði kvinnum og monnum er talan um toppdystir, tá Mjølnir og SÍ bresta saman í Badmintonhøllini í Klaksvík sunnudagin. Serliga hjá monnunum er kappingin á stigatalvuni javnari, nú stigini eru koyrd niður í helvt**




Hilmar Jan Hansen

Dystirnir í Eik-liguni hjá monnum um vikuskiftið eru teir fyrstu í seinnu hálvu av landskappingini. Tá fyrra hálva endaði fyri viku síðani, vórðu stigini koyrd niður í helvt, og tí er munurin millum liðini minkaður tilsvarandi. Tað átti at givið spenning í báðum endum.

Serliga verður áhugavert at síggja, hvat fer at henda í toppuppgerðini millum menninar hjá Mjølnir og SÍ, sum verður í Klaksvík sunnudagin. Liðini hava møtst tríggjar ferðir, og av teimum vann Mjølnir tær báðar fyrru ferðirnar og SÍ ta triðju ferðina. Nú fæst so enn eina ferð at síggja, hvør dregur longra stráið.

Í hinum dystinum tekur ÍF á Kambsdali í morgin ímóti Fleyr. Enn hevur ÍF einki stig fingið, men síðstu dystirnar er liðið farið at taka sett frá hinum, so tí verður eisini spennandi at síggja, um støðuga framgongdin hjá ÍF røkkur til at taka Fleyr.

## Mjølnir til roynd

Spenningurin í Eik-liguni hjá kvinnunum er ikki heilt so stórur, tí har hevur SÍ ligið klárt á odda alla tíðina, men líka so vist hevur tað verið, at Mjølnir hevur verið argasti kappingarneytin. Sunnudagin hava klaksvíkskvinnur møguleikan at nærkast SÍ, um tað eydnast at gera nakað við oddaliðið í hesi toppuppgerðini, ið fyri Mjølnir má metast sum sonn styrkiroynd.

Eisini er talan um ein nokk so avgerandi dyst millum Fleyr og TB í Gundadalshøllini sunnudagin, tí hesi bæði eru tey, ið kappast um at sleppa upp í part sum avbjóðari heilt har frammi. TB hevur tikið seg fram í síðstuni, samstundis sum spælið hjá Fleyr hevur svingað, so her kann alt henda.

Dráttur skal sunnudagin á útivølli møta ÍF á Kambsdali, og er hetta ein dystur, Dráttur á pappírinum er favorittur til, tí ÍF hevur higartil bara vunnið eina ferð í átta royndum. ÍF vil gera alt fyri at sleppa úr botninum, meðan Dráttur við sigri ikki missir sambandið við miðjuna á stigatalvuni.